# meiri enn eitt ár



*Natasha og 11 ára gamla dóttir hennara komu úr Jugoslavia til Hvalbiar fyri seks árum síðani. Tey eru 100% integrerað í føroyska samfelagið, men nú stúra tey fyri at verða rikin av aftur landinum, hóast tey meiri enn nakað annað vilja verða verandi í Føroyum*

at skalt tú koma til eitt annað land at búgva og arbeiða, skalt tú læra teg málið.

Men skipað undirvísing fyri útlendingar finst ikki í Føroyum, so tað vóru arbeiðsfelagarnir á flakavirkinum í Hvalba og vinfólk, sum lærdu hana føroyskt. Tað gjørdu tey við bara at tosa føroyskt við hana og at noyða hana at tosa føroyskt, so tað var uppá tann harða mátan. Men tað hevur givið gott úrslit og nú skalt tú lurta væl fyri at varnast, at Natasha ikki er innføddur hvalbingar.

Til stuttleika kann nevnast, so so inngrógvið er danskt mál í Føroyum, at Natasha eisini er komin at duga lesa danskt flótandi, bara av sjónvarpi, bókum og bløðum - men tað er ringt at tosa, heldur hon.

Men hon heldur at tað er ov vánaligt, at samfelagið krevur, at útlendingar skulu integrera seg, men at samfelagið hinvegin púra onki ger fyri at hjálpa útlendingum til at integrera seg.

– Hóast eg havi verið her í átta ár tilsamans, hevur hon enn ongantíð fingið tilboð um at læra føroyskt. Tað mátti hon klára sjálv.

– Men tað tekur tíð at koma á føtur og at standa á egnum beinum í einum fremmandum landi og at finna sítt pláss í samfelagnum.

Hon sigur annars, at hon stúrdi fyri at koma til Føroyar og serliga at tosa við fólk.

– Men eg føldi meg frá fyrsta degi hjartaliga vælkomna í Hvalba. Hvalbingar hava tikið ímóti mær sum einum av sínum egnu. Eg havi aldrin merkt, at nakar hevur gjørt mismun á okkum fyri tað um vit eru útlendingar og eg føli, at vit eru fullkomiliga góðtikin av bygdarfólkinum.

– Eg havi ongi skyldfólk í Føroyum, men nú havi eg so nógv góð vinfólk, at tað gongur av tí besta og vit stórtrívast.

Men Natasha leggur afturat, at hon dugir ikki at seta orð á, hvussu takksom hon er fyri alt, sum hvalbingar hava gjørt fyri hana.

– Teir hava hjálpt mær ótrúliga nógv og eg veit ikki, hvat eg skuldi gjørt uttan tey.

## Onki svar í eitt heilt ár

Hon hevur síðani endurnýggja arbeiðsloyvi tá ið tað hevur verið neyðugt og seinast, hon sendi inn umsókn, var í apríl í fjør, saman við øllum neyðugum skjølum.

– Seinast eg sá passið hjá mær var í apríl í fjør, sigur hon.

Natasha arbeiddi so á flakavirkinum í Hvalba, men tá ið tað fór á heysin í januar í ár, hevði hon onki arbeiði.

Men longu vikuna eftir fekk hon arbeiðsboð á fiskavirking á Tvøroyri og har var hon so í nakrar vikur.

– So komu boð frá ALS at hon hevði ikki rætt at arbeiða hjá Fiskavirking á Tvøroyri, tí hon hevði bara C arbeiðsloyvi og tað merkir, at hon er knýtt at einum ávísum arbeiðsgevara.

Tað hjálpti onki, at ført varð fram at talan var um sama arbeiðsgevara, tí Fiskavirking átti eisini virkið í Hvalba.

Hetta skilir Natasha ikki so nógv av, tí í 2001 var hon akkurát í somu støðu: Virkið í Hvalba fór á heysin, men tá kundi hon fara á Tvøroyri at arbeiða.

– Tá var eg í akkurát somu støðu, men tað er stórur munur á, hvussu eg verðið viðgjørd í 2001 og hvussu eg verðið viðgjørd nú.

Men har var ongin vegur uttanum. Hóast eg ikki hevði fingið svar uppá umsókn mína frá apríl í 2004, mátti eg aftur í mars í ár søkja innlendismálaráðið um arbeiðsloyvið, hesuferð til Fiskavirking á Tvøroyri, saman við eini váttan frá arbeiðsgevaranum um, at hon hevði arbeiðið har.

– Tá ið eg sendi umsóknina inn, lovaði tey at viðgera umsóknina skjótt, eftirsum at arbeiði bíðaði eftir mær.

Men heldur ikki hendan umsóknin gav nakað úrslit og hóast tríggir mánaðir eru farnir, er enn onki svar komið.

Av tí sama hevur hon heldur ikki rætt at til stuðul úr ALS, tí bara við einum C-arbeiðsloyvi, er ikki tøk á arbeiðsmarknaðinum.

– Hetta hevur sett meg í eina rættiliga knípu, tí eg havi lán í húsunum og eitt barn at forsyrgja.

## Pínir hana

Natasha sigur, at tað einasta, hon fekk at vita, er, at hon kundi søkja Almannastovuna um hjálp og tað hevur hon gjørt.

– Sostatt noyðast vit at liva av Almannastovuni, tí eg sleppi ikki til arbeiðis, hóast eg havi trý arbeiðstilboð.

Natasha sigur, at hetta pínir hana, tí hon ætlaði ikki at liggja samfelagnum til byrðu og hon heldur at tað er heilt burturvið at hon ikki kann sleppa til arbeiðis, tá ið hon er biðin at koma til arbeiðis.

– Eg vil bara sleppa til arbeiðis, so skuldi tað nokk gingið. Eg helt, at tað, sum hevði størstan týdning, at eg ikki lá samfelagnum til byrðu, men kláraði meg sjálva. Eg vil fegin arbeiða og betala mín skatt, men tað sleppi eg ikki. Ongin sigur, at tað skal vera ein dansur á rósum, men bara eg slapp til arbeiðis, skuldi eg nokk klára meg.

– Hesa seinastu fýra vikurnar havi eg ringt og ringt til Innlendismálaráðið, men tað ber ongantíð til at fáa fatur á rætta viðkomandi. Eg havi eisini givið innlendismálaráðnum mítt telefonnummar og biðið tey ringja aftur, men alt til fánýtis.

## Stúrir fyri at vera rikin av landinum

Natasha heldur lítið um slíka viðferð. Men tað, sum fekk bikarið at flóta var viðmerkingin hjá Jógvani við Keldu um Rapa hjúnini í Vestmanna.

– Eg má siga, at sum útlendingur í Føroyum var eg ikki sørt errin av Rapa hjúnunum, at tey kundu klára seg so væl í einum fremmandum landi, at tey kundu taka læraraprógv her. Men eg fekk ilt av teirri viðmerking tey fingu við á vegnum frá landsstýrismanninum í innlendismálaráðnum.

Innast inni stúrir Natasha fyri at vera koyrd av landinum aftur og hon sigur, at tað er ræðuligt at skula liva í slíkari óvissu so leingi.

– Tað hevði verið ein vanlukka fyri okkum at verðið send heimaftur, tí vit hava onki at fara heimaftur til, onki at búgva í, onki arbeiði og nú hava vit verið burtur so leingi, at vinirnar, eg hevði, havi eg eisini mist. Eg havi ikki verið á arbeiðsmarknaðinum í Jugoslavia, tí eg var so ung, tá ið eg kom til Føroyar, so er eri ikki í nakrari av teimum skipanum, sum eru har. Og møguleikarnir at fáa tak íbúð eru so slett ongir.

Hon søkti eisini fyri tveimum árum síðani um varandi uppihaldsloyvi í Føroyum. Men tað kundi hon ikki fáa, tí fyri at fáa tað, skal eg hava búð í Føroyum í sjey ár, uttan íhald og tær treytirnar havi eg ikki uppfylt. Tað árið eg var her frá 1997 til 1998, telja sostatt ikki við.

Fjórða juni var tað seks ár síðani hon kom aftur til Føroya og hennara inniligasta vón at hon kann verða verandi her, so at hon kann søkja um varandi uppihaldsloyvi.

– Føroyar eru eitt gott land at búgva í. Eg haldi, at føroyska samfelagið gevur okkum nógv, men eg haldi eisini, at vit royna at geva nakað aftur.

– Men tað er ikki lætt tá ið vit ikki sleppa at geva nakað frá okkum aftur til samfelagið, sigur Natasha Vukotic.